Góðir brúktir BILAR á goymslu

Ein **Mercedes Benz C.220** diesel, 6 ár, koyrt 125.000 km, svartur metallakk, svart leður inntrekk, sentrallás, el-rútar, el-sóltak, ABS-bremsur, luftpútur, radio/kassettuspælara, mahogny interiør, servostýring og alu felgur

Ein **BMW 525TDs**, 6 ára gamal, koyrt 127.000 km, gráur, metallakk, el-sóltak, el-rútar, sentrallás, airbag, alufelgur o.a.

Allir bilarnir eru í sera góðum standi og siggja út sum nýggir

AUTO-VULK
FR-900 Vágur
Fartlf. 223380
Tlf. 373680 - 373660
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR

Føroya størsta úrval av PAKKITILFARI úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com

Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
BERGUR Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

ÚTSØLAN
byrjar fríggjadagin 25. aug.
Nógv ymisk meturvøra úr 30-50% í avsláttri
Eisini eru nakrar seymimaskinur við avsláttri
Allar restir fyri hálvan prís
SEYMISKRÍNIÐ
Dr. Jakobsensgøta 16 • Box 320
110 Tórshagvn • Tel 31 40 05
Sosialurin - 311820

Bakarasveinur

søkist.

Bakaríið hjá Gunnleivi
Tlf. 312161 ella 221534

Leiga av ítróttarhøllini í Runavík

Tey, ið ætla at leiga ítróttarhøllina í Runavík veturin 2000/2001, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 31/8-2000.

RUNAVÁGAR KOMMUNA

Runavíkar Býráð

Lærari

Søkt verður eftir lærara til Fuglafjarðar skúla at byrja umleið 20. september. Starvið er fyri lærara, sum hevur barnsburðarfarloyvi í umleið 24 vikur.

Tímatalva:
2 t. í enskum í 5. fl.
2 t. í lívfrøði í 8. fl.
6 t. í ítrótti (gentur) í 3.–9. fl.
4 t. í handarbeiði í 5.–7. fl.
5 t. serligan tørv

Starvið verður lønt samb. galandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir saman við ljósriti av próvskjølum o.ø. verða at senda skúlanevndini í seinasta lagi mikudagin 6. september kl. 16.00.

Fuglafjarðar skúlanevnd
v/ Terja á Lakjuni
FO-530 Fuglafjørður

J|A|S|P|I KETLAR
Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu



Bæði dupultir og einkultir
Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð. Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.
- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum

MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Vaskifólk til Mýrifípuna

Vit søkja eftir dugnaligum vaskifólki 10 tímar um vikuna at byrja 1. sept.

Tann, ið søkir, skal eisini vera avloysari á stovninum. Nærri fæst at vita við at tosa við leiðaran.

Dagstovnurin Mýrifípan
826 Trongisvágur
Tlf. 372700

Summarfrí

Vegna summarfrí er avgreiðslan á Filmseftirlitinum stongd frá 28. august til 15. september 2000.

FILMSEFTIRLITIÐ
N. Winthersgøta 7 · Boks 124 · 110 Tórshavn
Tlf. 31 73 44 · Fax 31 93 30

Frá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Fundur

verður mánakvøldið 28. aug. kl. 20.00 í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.

Skrá:
1. Annar og møguliga triði uppstillingarfundur til býráðsvalið
2. Landsfundurin
3. Ymiskt

Nevndin

Dagrøktarmamma í Hósvíkar kommunu

Søkt verður eftir avloysara fyri dagrøktarmammu at byrja skjótast møguligt.

Nærri fæst at vita við at ringja 422416 ella 422435.

Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 27. august kl. 16.00 heldur Johs. Andr. Næs fyrilestur um kristniundirvísing í skúlaverkinum í kirkjuni í Hósvík.

FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR
Postboks 1121 - tlf. +298 321132 - fax +298 321761 - FO-110 Tórshavn



Minningarorð um Vilhjálm Patursson

Deyðin spyr ongan til ráðs, men kemur altíð óboðin og óynsktur á gátt. Onkuntíð kortini meira óvæntaður enn aðrar tíðir.

Sunnudagin 13. august ár 2000 andaðist Vilhjálmur Patursson knapt áttati tvey ára gamal.

Fyri tey, ið stóðu Vilhjálmi næst, vóru deyðsboðini helst ikki heilt óvæntað, tí hesi seinastu árini var hann heilsuveikur og troyttur. Tað duldi hann heldur ikki fyri.

Fyri okkum, ið hava verið nærmastu grannar hansara í meira enn tríati ár, fer tað at kennast undarligt, at hann ikki verður at síggja her niðri á Velbastaðvegnum, tí morgunmaður var hann burturav, og altíð til dystin fús og á ferð. Lættur sum fuglurin, oftast meira rennandi enn gangandi.

Fyri flestum okkara man tað vera so, at tey vinfólk, ið tú fært í lívi tínum, seta onkur spor, sum tú ikki gloymir, og sum eru av stórum týdningi fyri teg.

Okkurt tílíkt vil eg fegin nevna í hesum fáu minningarorðum.

Vilhjálmur var ein ógvuliga positivur og kveikjandi maður, hevði gott mót, og hevði tiltrúgv uppá framgongd; ikki dapurskygdur. Møtti tú honum ein illsligan tungan regndag, og byrjaði prátið við at gremja teg um hetta regn, so var svarið: Tey munnu ikki vera betur fyri, ið ongan regndropan hava.

Gramdi tú teg ein annan dag um, at eingin sól var í Føroyum, so kundi hann minna teg á, at tey mundu ikki vera betur nøgd, sum kódnaðu av hita og sól. Hann var ikki ein av teimum, ið gramdi seg um føroyska veðurlagið, men hevði viðføddan alsk til føðiland sítt. Tað kanst tú vísa á ymiskan hátt.

Seinasta prátið, ið vit høvdu báðir so hugnaliga saman, mundi vera dagin fyri, sum hann gjørdist rættiliga sjúkur.

Veðrið var so sera gott henda dagin. Hann sat á einum lágum krakki í túninum og flutti hann hann úr stað so hvørt, sum hann tók okkurt órudd upp úr túninum.

Nei, nú tjeni eg einki meira, og eg orki einki.

Tú hevur kortini ikki mist eyga fyri, at plastikk, sigarettstubbar og fløskubrot ikki prýða um okkara vegir og tún. Hann bara smíltist. Men eg hugsaði sum so: Gævi so var, at fleiri av okkara ungu høvd henda hugburð tín, so hevði Árvegurin ikki sæð soleiðis út, sum hann plagar at gera 3. ólavsøkumorgun. Ikki minst í ár.

Eina tøkk vil eg fegin, og helst fleiri við mær, veita Vilhjálmi fyri tað tol og beinasemi, ið hann sýndi mongum ungdómi, ið hann vildi taka í arbeiði, sum var hansara lívsyrki at bøta og fríðka um vegir okkara, ið ikki mundu vera so góðir, tá ið hann tók hetta arbeiði á seg.

Góða Sólveig. Fyri teg man missurin og saknurin kennist svárast, og vit eru mong, ið hava samkenslu við tær og tykkum.

Eg fari at enda hesi fáu minningarorð um Vilhjálm við teimum sera vøkru orðunum, ið abbi hansara Jóannes Patursson á sinni endar eitt av mongu vøkru sálmaørindi síni:

Í túsund ára tal
Guð menti oss so væl,
at fólk til føðiland
tað bant sítt trygdarband,
sum aldri kundi vikna.

Friður veri við minninum um Vilhjálm Patursson.

Sjúrður



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: J. H. Dragasund
Boks 3007
110 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: KORNLENDI

K	A	N	N	I	R	A	L	I	S	M	A		O	R	Ð
A	F	T	U	R	Í	S	E	S	S	I	N		R	A	Ð
N	R		L	I	T	K	A				O	R	Ð	I	Ð
N	I	E	L	S			N	O	R	Ð	M	E	M	N	
I	K		P		U	K		R	A		A	A	A	A	A
N	A	M	U	R		N	E	V	T	O	L	L		R	R
G		A	N	O	R	A	K		T	V	I	S	T		R
A	L	S	K	Y	N	S		M	A	I		K	U	T	A
R	E	S	T		A	S	K		R		S	Ú	P	A	N
N	Y			S		I		S	Á		Á	L	O	P	
E	K	T	A	K	O	N	A	N			M	I	L	A	N
V	U	N	D	I	N			A	S	T	A		E	R	I
N	R		V	P	G		I	R	A		L	E	V	I	S
D		R	E	A	L	I	N		D	O		G			S
239 S	O	N			A	O	R	T	A		G	O	R	R	A
N	Á	T	T	A	R	D	I	M	M	I		N	Á	I	N

Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

240

Loysunarorðið: .....
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Kalr N. Hansen týddi*

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Grønur var dalurin** - *Richard Llewellyn/ Knút Olsen týddi*
- ❑ **Tit bygdu hetta land - Arbeiðsmarknaðurin** - *Jákup Pauli Strøm*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Frumsagnir** - *Neil Philip/Amy Tausen týddi*
- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt